## Todi setti lív í Start-álopið

Mikukvøldið spældi norska felagið Start sín fimta dyst í tippuliguni. Dysturin var á heimavølli ímóti Fredrikstad, og enn einaferð endaði málleyst. Start hevur ikki megnað at skorað á heimavølli í hesum kappingárinum. Todi Jónsson kom saman við Stefan Barlin inn, tá ið tað restaðu um 20 minuttir, og heimasíðan hjá Start skrivar, at tað kom veruligt lív í álopsspælið, og Start mest sum hertók brotsteigin hjá Fredrikstad. Tað eydnaðist tó ikki at fáa mál, og tað var eitt vónbrot fyri heimaliðið, sum bert hevur vunnið eina av fimm dystum higartil.




## Serbiskur styrkur til HB

Nú kann HB-venjarin seta serbiska miðvallarspælaran Jovan Radinovic-Panic á liðið. Pappírini, sum felagið hevur bíðað eftir, eru komin fram, og Jovan kann spæla við í stórdystinum ímóti KÍ í Klaksvík sunnudagin. 26 ára gamli Jovan hevur vant við HB seinastu vikurnar, men hann hevur ikki kunnað spælt orsaka av vantandi loyvum. Nú er alt greitt, og HB-venjarin kann nú velja eina spennandi Panic-loysn til týðandi dystin sunnudagin.

# Føroyingarnir høvdu gott kvøld í Danmark

**Jónas Tór Næs var við til at koppa oddaliðnum úr Randers, og Andrew av Fløtum legði upp til mál í sigrinum hjá Fremad Amager, tá ið dystir vóru í næstbestu donsku fótbóltsdeildini í gjárkvøldið**

FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað gekk væl hjá føroysku fótbóltsspælarunum í næstbestu donsku deildini í gjárkvøldið. Frem, Fremad Amager og Lyngby, sum øll hava føroysk umboð á liðnum, spældu øll dystir, og tvey av teimum vunnu. Triðja liðið spældi javnleik.

Frem hevur staðið seg munandi betri, enn tey flestu høvdu roknað við, at tá ið seinna hálva av donsku 1. deild byrjaði aftur í mars. Liðið misti nógvar stuðulsspælarar í vetur, og tí roknaðu tey flestu við, at liðið fór at stríðast í botninum.

Men soleiðis hevur als ikki verið. Frem hevur vunnið fleiri dystir, og í gjárkvøldið koppaðu teir oddaliðnum úr Randers.

Jónas Tór Næs spældi sum vant á høgra bakki, og hann var við allar 90 minuttir av dystinum, sum Frem vann 2-0.



*Christian Lamhauge Holst spældi allan dystin í álopinum hjá Lyngby í javnleikinum ímóti Fredericia. Lyngby er nú av álvara við í uppflytingarstríðnum til superliguna*

*Mynd: Svend Jakobsen*

### Andrew spældi væl

Fremad Amager spældi á heimavølli ímóti Brabrand, og tað eydnaðist teimum av Amager at vinna dystin 2-1.

Andrew av Fløtum byrjaði dystin sum ein av trimum álopsspælarum, og hann var við í nógvum hjá Fremad Amager. Andrew hevði onkra góða roynd, og hann legði upp til fyrra málið hjá Fremad Amager. Beint fyri leiklok var hann skiftur út, tá ið heimaliðið vildi hava tíðina at ganga.

Thomas Christensen skoraði bæði málini hjá Fremad Amager.

Fremad Amager liggur nú sum nummar 7 í donsku 1. deild, men vónin um uppflyting er ógvuliga lítil, nú kappingin nærkast endanum.

### Lyngby hongur í

Christian Lamhauge Holst, sum hevur føroysk ættarbond og hevur spælt ein landsdyst fyri Føroyar, var við í allar 90 minuttirnar, tá ið Lyngby spældi á heimavølli ímóti Fredericia. Tað var ein strika í rokningina, at Lyngby ikki vann dystin. Høvdu teir megnað tað, lógu teir lið um lið við Vejle á uppflytingarplássinum.

Men tað kundi enda við tapi hjá Lyngby. Fredericia var á odda 2-0, tá ið tað manglaði ein hálvur tími av dystinum. Tað eydnaðist tó Lyngby at skora tvær ferðir og harvið fáa eitt stig burtur úr dystinum. Christian Lamhauge Holst var ágrýtin í álopinum, men hann skoraði ikki hesaferð.

Lyngby liggur ávíkavist trý og fýra stig aftanfyri tey bæði fremstu liðini í deildini, men Lyngby hevur ein dyst til góðar, so møguleikin fyri uppflyting til superliguna er avgjørt til staðar.

**Danska 1. deild**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Randers FC | 23 | 14 - 3 - 6 | 45 | 23 | 22 | 45 |
| 2 Vejle | 23 | 13 - 5 - 5 | 43 | 26 | 17 | 44 |
| 3 Kolding | 23 | 13 - 3 - 7 | 43 | 32 | 11 | 42 |
| 4 Lyngby | 22 | 12 - 5 - 5 | 42 | 39 | 3 | 41 |
| 5 Køge | 22 | 10 - 8 - 4 | 39 | 27 | 12 | 38 |
| 6 Fremad Am. | 23 | 11 - 4 - 8 | 41 | 41 | 0 | 37 |
| 7 Frem | 23 | 10 - 4 - 9 | 40 | 31 | 9 | 34 |
| 8 Herfølge | 22 | 9 - 5 - 8 | 42 | 26 | 16 | 32 |
| 9 LFA | 22 | 8 - 6 - 8 | 41 | 34 | 7 | 30 |
| 10 FC Fredericia | 22 | 9 - 3 - 10 | 35 | 39 | -4 | 30 |
| 11 Ølstykke | 22 | 8 - 4 - 10 | 24 | 29 | -5 | 28 |
| 12 AB | 23 | 8 - 3 - 12 | 30 | 45 | -15 | 27 |
| 13 HIK | 23 | 5 - 10 - 8 | 26 | 31 | -5 | 25 |
| 14 Brabrand | 23 | 7 - 4 - 12 | 23 | 43 | -20 | 25 |
| 15 Skjold | 23 | 4 - 4 - 15 | 21 | 53 | -32 | 16 |
| 16 Brønshøj | 23 | 1 - 7 - 15 | 21 | 57 | -36 | 10 |

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen, Jónas Þór Næs (Frem), Andrew av Fløtum (Fremad Amager), Christian Holst Lamhauge (Lyngby), Atli Gregersen (Skjold)

**Norska Tippeligan**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brann | 5 | 3 - 2 - 0 | 8 | 3 | 5 | 11 |
| 2 Lillestrøm | 5 | 3 - 2 - 0 | 10 | 6 | 4 | 11 |
| 3 Stabæk | 4 | 2 - 2 - 0 | 6 | 2 | 4 | 8 |
| 4 Sandefjord | 5 | 2 - 2 - 1 | 6 | 6 | 0 | 8 |
| 5 Lyn Oslo | 5 | 2 - 2 - 1 | 6 | 7 | -1 | 8 |
| 6 HamarKam | 5 | 2 - 1 - 2 | 7 | 5 | 2 | 7 |
| 7 Odd Grenland | 5 | 1 - 4 - 0 | 4 | 2 | 2 | 7 |
| 8 Molde | 5 | 2 - 1 - 2 | 4 | 4 | 0 | 7 |
| 9 Rosenborg | 4 | 1 - 2 - 1 | 6 | 4 | 2 | 5 |
| 10 Våleranga | 5 | 1 - 2 - 2 | 3 | 5 | -2 | 5 |
| 11 Start | 5 | 1 - 2 - 2 | 2 | 5 | -3 | 5 |
| 12 Fredrikstad | 5 | 0 - 3 - 2 | 3 | 6 | -3 | 3 |
| 13 Viking | 5 | 0 - 2 - 3 | 3 | 7 | -4 | 2 |
| 14 Tromsø | 5 | 0 - 1 - 4 | 1 | 7 | -6 | 1 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (Start)

FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






*Hvar er bólturin?*

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.